

## United vann umdystin

Í gjárkvøldið spældu Manchester United og Reading umdyst í stóru ensku steypakappingini, FA Cup. Fyrri dysturin endaði við einum 1-1 javnleiki á Old Trafford, tí skuldi nýggjur dystur spælast. United fekk eina dreymabyrjan, tá teir komu á odda 3-0 eftir fimm minuttum. Málini skutu Heinze, Saha og Solskjær. Reading kom tó innaftur í dystin. Kitson minkaði til 3-1 um miðjan fyrra hálvleik, og átta minuttir fyri leiklok minkaði Lita um munin til 3-2. Í síðstu minuttunum hevði Rading eitt skot á tvørtræið, men nærri komu teir ikki. United vann dystin 3-2, og sostatt eru teir víðari í FA Cup.

## Mourinho keypt verjuleikara

Venjarin hjá Chelsea, José Mourinho, vísti leingi sína ónøgd við, at felagið ikki keypti nakran verjuleikara. Í januar mánaði royndu teir at fáa fatur á onkrum, men einki riggaði. Nú hevur Chelsea so endiliga fingið ein nýggjan verjuleikara. Talan er um 20 ára gamla portugisan Manuel Da Costa, sum skiftir til Chelsea í summar. Ungi verjuleikarin kemur frá hollendska stórfelagnum, PSV Eindhoven, har hann í ár er vorðin fastur maður á liðnum. Í síðstu viku var hann á liðnum, sum vann 1-0 á Arsenal í Champions League.

## FM hjá børnum verður um vikuskiftið

**FM í flogbólti hjá yngru deildunum verður á skránni um vikuskiftið, og sunnudagin vera fleiri finalur í Hoyvíkshøllini**

FLOGBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Í gjár skrivaði portalurin, at stórur finaludagur hjá børnum í flogbólti verður í Hoyvíkshøllini leygardagin. Hetta er ikki heilt rætt.

FM kappingin í yngri deildum í flogbólti verður á skránni um vikuskiftið, og her fara allir aldurbólkar til stroks leygardagin, tá innleiðandi umførini vera leikt í Gundadalshøllini, Hoyvíkshøllini og í høllini í Kollafirði. Ætlanin hevur alla tíðini verið at havt FM komandi vikuskiftið, men í eina tíð hevur ivi tó verið um hetta. Nú hevur flogbóltssambandið tó fingið Hoyvíkshøllina, og tí er greitt, at finalurnar vera á skránni um vikuskiftið. Finalurnar hjá yngstu aldursbólkunum vera á skránni leygardagin, meðan stórur finaludagur verður í Hoyvíkshøllini sunnudagin, har fýra teir elstu aldursbólkarnir spæla finaludystirnar. Skráin sunnudagin sær soleiðis út:

**Kl. 9.00:**
Finala dreingir 14 ár
**Kl. 13.00:**
Finala kvinnuunglingar
**Kl. 15.00:**
Finala dreingir 14 ár
**Kl. 17.00:**
Finala mansunglingar

# Ungur NSÍ-leikari til OB

**15 ára gamli NSÍ-leikarin, Viljormur H. Davidsen, fer ein av komandi døgunum at skriva undir ungdómssáttmála við danska superligufelagið, OB**

FÓTBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Talið av ungum føroyskum fótbóltsleikarum, sum royna eydnuna í øðrum londum, veksur alsamt, og nú skal enn ein av okkara ungu leikarum royna seg í stórum felag. Talan er um 15 ára gamla NSÍ-leikaran, Viljorm H. Davidsen.

Í januar mánaði var ungi runavíkingurin í Danmark í tvær vikur, har hann royndarvandi við danska superligufelagnum, OB. Venjingin hevur eftir øllum at døma gingið væl, tí nú hevur felagið boðið honum ein ungdómssáttmála, har hann skal leika saman við ungu leikarunum hjá felagnum, samstundis sum hann skal ganga í 10. flokki.



*15 ára gamli NSÍ-leikarin, Viljormur H. Davidsen, fer at skriva undir ungdómssáttmála við danska superligufelagið, OB, ein av nærmastu døgunum*

**Sterkur verjuleikari**

Viljormur H. Davdisen var partur av dreingjaliðnum hjá NSÍ, sum endaði á øðrum plássi í landskappingini seinasta kappingarár. Kappingin millum VB/TB og NSÍ var sera hørð í hesum aldursbólkinum, men at enda vann VB/TB meistaraheitið, meðan NSÍ mátti taka til takkar við øðrum plássi.

Viljormur hevur eisini leikt við ungdómslandsliðunum hjá Føroyum, og her hevur hann verið mest sum fastur maður á bæði U-15 og U-17 landsliðunum seinastu árini.

Viljormur er stórur og sterkur verjuleikari, hann skjýtur við vinstra beinið, og tí verður hann ofta nýttur á vinstra bakki. Hann hevur tó eisini roynt seg í miðverjuni, so talan er um ein fjølbroyttan verjuleikari.

Sum skilst, so hevur Viljormur sjálvur tikið avgerðina um at fara til Danmarkar. Hann hevur ætlað sær niður í skúla, og tí kom sáttmálin frá OB væl við. Nú kann hann fara til Danmarkar at ganga í skúla, samstundis sum hann sleppur at royna seg í einum av sterkastu feløgunum í Danmark.

Sáttmálin millum Viljorm og OB er ikki endaliga komin í rætt lag enn, men sum skilst, so verður hesin undirskrivaður ein av nærmastu døgunum. Hetta ger, at Viljormur verður knýttur at ungdómsarbeiðnum hjá OB frá komandi kappingarárinum í Danmark. Har skal hann fyrst vera í eitt ár, og so fer tíðin at vísa, um uppihaldið í danska felagnum verður enn longri.

# Fyrrverandi Stjørnu-venjari er farin

**Ungarin, Lazar Kurdic, sum vandi besta kvinnuliðið hjá Stjørnuni seinasta kappingarár, doyði brádliga sunnukvøldið, eftir at hann var farin á sjúkrahús við sterkari pínu í høvdinum**

HONDBÓLTUR

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Fyrr í vikuni komu boðini til Klaksvíkar um, at fyrrverandi Stjørnu-venjarin, Lazar Kurdic, var deyður. Lazar var venjari hjá besta kvinnuliðnum hjá Stjørnuni síðsta kappingarár, og hann førdi tær til meistaraheitið og í steypafinaluni, har tær tó máttu lúta fyri Neistanum.

**Hevði sterka høvuðpínu**

Samstarvið millum Stjørnuna og Lazar vardi bert tað eina árið, og eftir lokið kappingarár í fjør valdi Lazar at fara heimaftur til Ungarn, haðani hann er ættaður.

Onkur í Klaksvík hevur havt regluligt samband við Lazar Kurdic, síðani hann fór úr Føroyum, og sum skilst, so fór Lazar á sjúkrahúsið mitt í síðstu viku við sera sterkari pínu í høvdinum. Tá hann kom til sjúkrahúsið, bleiv hann kannaður í høvdinum, men læknarnir funnu einki, sum bendi á, at nakað álvarsligt var á vási. Fyrrverandi venjarin hjá Stjørnuni bleiv tí sendur heimaftur, men hann slapp tó ikki av við pínuna í høvdinum.

Sunnudagin bleiv pínan aftur so ræðulig hjá Lazar Kurdic, at hann enn einaferð valdi at fara á sjúkrahús. Her bleiv hann innlagdur, men pínan versnaði tó støðugt. Seint andaðist Lazar Kurdic. Læknarnir hava síðani staðfest, at talan helst var um krabbamein í høvdinum.

Lazan var giftur maður, og hann átti tvey børn. Hann átti ein son og eina dóttir, sum bæði eru vaksin. Leggjast kann afturat, at dóttirin hevur stóran áhuga fyri hondbólti, eins og pápin hevði tað. Hon er yrkisleikari í Póllandi.



*Fyrrverandi Stjørnu-venjarin, Lazar Kurdic, doyði sunnukvøldið á einum sjúkrahúsið í Ungarn. Hann hevði krabbamein á heilanum*